Helgi Abrahamsen
Steffan Klein Poulsen
Bárður á Lakjuni
Jaspur Langgaard
Hanna Jensen
løgtingsfólk

Broytingaruppskot

til

3. viðgerð av

Løgtingsmáli nr. 14/2025: Uppskot til løgtingslóg um fosturtøku (Fosturtøkulógin)

b r o y t i n g a r u p p s k o t

Í § 20 verður "1. juli 2026" broytt til: "1. januar 2027".

Viðmerkingar:
Málið um fosturtøku, sum er rættiliga grundleggjandi fyri nógvar føroyingar, taldist ikki millum høvuðsevnini í valstríðnum til seinasta løgtingsval. Fólkið valdi tí í stóran mun eina samanseting av Løgtinginum út frá øðrum spurningum enn fosturtøkumálinum.

Í lógaruppskotinum er ásett, at løgtingslógin kemur í gildi 1. juli 2026, so at tíð er at fyrireika seg til broytingarnar sambært uppskotinum.

Við hesum broytingaruppskotinum verður skotið upp, at gildiskoman verður útsett til 1. januar 2027. Tá hevur løgtingsval verið, og veljararnir hava tí í størri mun havt møguleika at valt eitt nýtt Løgting út frá hesum spurninginum, sum er so grundleggjandi hjá so mongum.

Á Løgtingi 4. desember 2025

Helgi Abrahamsen Steffan Klein Poulsen

Bárður á Lakjuni Jaspur Langgaard

Hanna Jensen